# Vegleiðing til uppsetingarlið

## LEYGARDAG

### Generelt

- Hóast skúlin hevur elektroniska teldustýrda læsiskipan á flestu hurðum, so er neyðugt at ansa eftir, tá farið verður frá skúlanum, at eingin hurð stendur ólæst.
- Ljósið í skúlanum tendrar og sløkkir automatiskt í flestu rúmum. Nøkur rúm eru, har man tendrar og sløkkir manuelt. Ansi eftir, at hesi ljós eru sløkt, tá farið verður frá skúlanum.
- Mælt verður til, at tann, ið leygardag flytur lutir og ruddar fyri í einum øki, eisini sunnudag er við til at seta upp á pláss aftur í sama øki (viðkomandi minnist best, hvar ymsu lutirnir stóðu).
- Gerð tekning ella tak myndir av uppstillingini, innan borð, stólar o.a. verða flutt.
- Ansið eftir lutir ikki verða drignir eftir gólvinum, ella at lutir verða mistir niður, tá arbeitt verður
  - Serliga timburgólvið er viðkvæmt og tolir lítið av
  - Betonggólvið kann eisini fáa keðiligar skøvur, sum verða sjónligar við tað, at yvirflatan er so sløtt og blonk
- Ansið eftir at veggir o.a. ikki verða skøvaðir, tá koyrt verður aftur og fram við allari útgerðini.

### Miðhøll (møtihølið):

- Ruddi burtur leys borð, sofur, borðtennisborð o.l., ið stendur inni á gólvinum, og setið hetta inn á økið aftanfyri súlurnar undir brúnni. Farið væl um útgerðina hjá skúlanum, og ***ikki stápla sofurnar hjá skúlanum***!!!
- Nakrar sofur og stólar skula setast soleiðis, at fólk kunnu seta seg í tey, um onkur eftir møtini hevur tørv á einum práti við tey í forbønartænastuni, Glóðini o.ø.
- Setið svørtu stólarnar (hjá skúlanum) upp ***(myndir 1)***.
- Setið nakrar eyka stólar fram til tónleikararnar.

- Teknikarar seta tónleikaútgerðina upp. Tó skal uppsetingarliðið seta hesa útgerðina upp:
  - Setið klaverið á statività / stálrammuna ***(mynd 2)***.
  - Setið hátalarastavitini hvør sína megin pallin, og lyfti hátalararnar uppá stativini. Ansi eftir, at brúka tey røttu stativini (stál-stativ við kasti), og at hátalarin verður rætt ísettur ***(mynd 3)***.
  - Setið stóru bass-hátalararnar við síðuna av hátalarastativunum, og koppið teimum á ***(mynd 4)***.
- Stóri vognurin við mixipultinum skal setast miðskeiðis í salin, og loki skal takast av og setast onkrastaðni burtur frá ***(mynd 5)***.
- Vognurin við trummunum skal koyrast yvir har sum trummusettið plagar at standa – trummusláarin setir sjálvur trummusettið upp.
- Borð til sjónvørpuna (videokanónina) skal setast har, sum sjónvørpan vanliga stendur.
- Kunningardiskurin skal setast upp aftast móti betongvegginum fram við rampuni.
- Set onkra sperru (borðtennisborð ella annað) upp ovast ***(mynd 6)*** og niðast á brúnni ***(mynd 7)***.

**Kantina:**

- Køksliðini taka sær av at seta borðini upp – uppsetingarliðini hjálpa til eftir tørvi ***(mynd 8)***.

**Køkur:**

- Øll køksútgerð skal koyrast inn í skúlastovuna. Køksfólkini taka sjálvi útgerðina av vogninum.

**Sunnudagsskúlin:**

- Stóra rúmið
  - Koyri vognin inn í stóra sunnudagsskúlarúmið
  - Borð, stólar o.a. í rúminum skulu stáplast upp aftast í rúminum ***(mynd 9)***.
  - 8 røðir á 7 stólar (bláu stólarnir hjá Lívdini) skula setast upp ***(mynd 10)***.
  - Gott pláss skal vera við inngongdina til hølið, og einki má setast frammanfyri hurðarnar út í tún.

  - Teknikari setir tónleikaútgerðina upp. Tó skal uppsetingarliðið seta hesa útgerðina upp:
    - Keyboard skal pakkast út og setast á stativið og hátalarar skulu lyftast upp á stativini ***(mynd 11)***.
    - Miksipulturin verður settur á ein av hátalarakassunum aftast í hølinum ***(mynd 10)***.
  - Vognurin til útgerðina skal setast til viks eftir uppsetingina, so hann er sum minst í vegin.
- Innasta rúmið
  - Rudda fyri aftast í rúminim (útvikið), og set 40 stólar upp (bláu stólarnir hjá Lívdini) og set tveir stáplar á 10 stólar inn í rúmið ***(mynd 12)***.
  - Set tann serliga sunnudagsskúlavognin tvørt fyri 2-3 m frammanfyri fremstu stólarnar ***(mynd 13)***.
- Ytsta rúmið (við stóra rútinum)
  - Setið eini 15 stólar upp í rúminum ***(mynd 14)***

**Barnaansing:**

- Koyrið vognin heilt inn í rúmið.
- Takið stóru lutirnar av vogninum ***(mynd 15)***. Hinar lutirnar taka hjálparfólkini í barnaansingina sjálvi av vogninum, og tey seta alt upp á vognin aftur, tá ið møtini eru liðugt.
- Setið nøkur borð saman til eitt langt borð – setið stólar til langa borðið ***(mynd 16)***.

## SUNNUDAG:

### Áðrenn møtið:

- Tá kavi er, skal kavin gravast av økinum framman fyri inngongdina og út til parkeringsplássini (ein uml. 2 m breiður geiri).

### Undir møtunum:

- 2-3 menn vísa fólki sess í byrjanini av báðum møtunum (teir fyrstu 15 minuttirnir).
- 2-3 menn eru tøkir fyrstu 20 minuttirnar á báðum møtunum at bera eyka stólar inn eftir tørvi.

### Eftir møtini:

- Tá síðsti sangurin verður sungin áðrenn stegðin, kunna aftastu stólarnir stáplast upp, fyri at geva rúm.
- Ruddingin í miðhøllini ***má ikki byrja*** fyrr enn møtið er orduliga er liðugt:
  - Ruddið (savnið) sangheftir saman.
  - Setið stólar, sofur, borð o.a. upp á pláss.
  - Lutir hjá skúlanum skula setast fram á sama stað, sum teir stóðu.
  - Útgerðin í miðhøllini (møtisalinum) skal setast upp aftur sum hon stóð.
- Borð og  stólar í sunnudagsskúlanum og barnaansingini skula setast upp á pláss aftur.
- Allir lutirnir, ið Lívdin eigur, skulu savnast saman og flytast upp á pláss í goymsluhølinum:
  - Seti stólarnar innast í goymsluhølinum.
  - Seti vognarnar upp móti vegginum í goymsluhølinum.
- Burturkast skal berast niðan í bingjuna uttanfyri ***(mynd 17)***
- Áðrenn farið verður skal ansast eftir, at øll vindeygu eru latin aftur og allar hurðar læstar ***(mynd 18)***
- Og til allar seinast: Ansi eftir:
  - at úthurðarnar, sum ikki eru partar av automatisku lásiskipanini, eru læstar (*dømi eru á* ***mynd 19***)
  - at ungdómurin ikki hevur gloymt at taka plastikíløtini av ljósfølarunum ***(mynd 20)***